## Eivør gull í Íslandi

Um jóltíðir handaði íslendska plátufelagið Sena Eivør gullfløgu, tí fløgan Mannabarn hevur selt meiri enn 5000 eintøk í Íslandi. 21. desember boðaði íslendska plátufelagið Sena frá, at teir fóru at handa Eivør Pálsdóttir gullfløgu. Hetta tí, at fløgan hevur selt meiri enn 5000 eintøk í Íslandi. Faktiskt eru einki minni 7300 eintøk av Mannabarn seld í Íslandi. Aðrir tónleikarar ið hava vunnið gull í íslandi í ár eru: Mugison, Hjálmar, Pall Óskar, Sprengjuhöllin, Guðrún og Friðrik, Laddi.



## Startpakki í Klaksvík

Heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu skrivar í morgun, at í sambandi við at startpakkaskipanin byrjar 1. februar 2008 verður kunnandi fundur fyri vinnurekandi í Klaksvíkar Kommunu í býráðshøllini mikudagin 9. januar kl. 13.00. Miðlan letur nýggjum borgarum í Klaksvíkar Kommunu ein startpakka. Í hesum pakka er millum annað neyðug upplýsing um kommununa, umframt avsláttarmerkir við tilboðum frá vinnurekandi, sum einans nýggir tilflytarar kunnu fáa ágóðan av. Nýggj húsarhald kunnu brúka avsláttarmerkini hjá vinnurekandi, ið eru partar av skipanini.

# Jólakalendarin – ein góð jólagáva



*Stjórin á 62° Norður, Kent Christensen, finnur høvuðsvinnaran í stóra bunkanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Bassi var eisini framvið í Miðlahúsinum og kunngjørdi vinnarar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Finnur Hansson, sølumaður hjá Poul Michelsen, kunngjørdi vinnaran av bæði Faxe Kondi og Merrild-kaffi. Hesir vóru ávíkavist Jan Nielsen og Jan Willemoes*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sera nógv fólk luttóku í Jólakalendara-kappingini hjá Sosialinum, og vinnararnir fingu í gjár eina seinkaða, men góða jólagávu**

JÓLAKALENDARI

Ein dreymaferð til Disneyland í Florida frá ferðaskrivstovuni 62° Norður. Boblandi gosbað frá Demich. Televarpsmótakara við alskyns møguleikum frá Føroya Tele. Familjupakki við gisting á Sjómansheiminum í Havn, gávukort frá Bowlinghøllini í Havn, Havnar Bio og Hvonn. 10 kassar av brúsandi Faxe Kondi frá og einki minni enn átta kilo av krútsterkum kaffi frá heilsøluni Poul Michelsen. Hetta vóru vinningarnir, ið sjey heppin fólk ognaðu sær í gjár. Sjey fólk, sum høvdu tikið lut í Jólakalendarakappingini, sum Sosialurin skipaði fyri í desembermánaði.

Høvuðsstuðlarnir í kappingini vóru savnaðir í Miðlahúsinum fyrrapartin í gjár, har teir saman við James Olsen, verti á Rás2, í beinleiðis útvarpssending kunngjørdu mongu vinnararnar.

Tað vóru tær báðar fittu diddurnar á Eiði, Helena Juul og Jennleyg Juul Kallsoy, sum vunnu ferðina til Disneyland. Astrid Gullfoss vann gosbaðið og Karin Kirke Petersen televarpsmótakaran. Helena Svabo Ziska fekk familjupakkan, Jan Willemoes teir tíggju kassarnar av sodavatn og Jan Nielsen vann átta kilo av kaffi.



*Heini Joensen, leiðari á Demich, avdúkar beinleiðis á Rás2, at Astrid Gullfoss vann gosbaðið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Birgir Waag Høgnesen frá marknaðardeildini á Sosialinum hevur tikið lepan sum sigur, at Karin Kirke Petersen vann televarpsmóttakaran*

*Mynd: Jens Kristian Vang*